bókstav aftur í alfabetinum. Gjørdist til Cain við C sum í Carlos, og gjøgnum fleiri ár varð Bourne – alias Cain - tilvitað settur í samband við morð á navnframar persónar. Endamálið var at bjóða Carlos av og hótta hansara støðu sum fremsti leigudrápsmaðurin og harvið eisini raka hansara ego.

Ætlanin miseydnaðist, tá Cain verður skotin umborð á einum skipi í Miðjarahavinum. Uttan vit verður CIA-skapti leigudrápsmaðurin skolaður upp á land í eini portugisiskari oyggj, og ein drukkin bretskur lækni bjargar lívi hansara.

Minnið er tó burtur, og Bourne stríðist fyri finna samleika sín. Á vegnum finnir hann sína Mariu, umframt at hann eisini finnur aftur til Alex Conklin – eftir at teir báðir hava roynt at myrt hvønnannan.

*The Bourne Identity* skapti eina legendu innan krimi-heimin. Bókin gjørdist enntá nummar tvey, tá Publishers Weekly skuldi kjósa bestu "Spy-novel" nakrantíð.

### The Betrayal - Svikið

Bourne hevur tó ferðast víða síðani tá. Undir følskum fortreytum varð hann lokkaður til Hong Kong, tá amerikanska stjórnin ikki sá sær aðrar útvegir. Hann hevur gjørt enda á Carlos, tá ego'ið hjá hesum ikki longur toldi, at spurnartekin vórðu sett við, hvør var tann størsti. Og hann fann aftur til son sín, Joshua, sum hóast alt ikki var deyður, tá vietnamesiski jagarapiloturin á sinni fleyg yvir Phnom Penh.

Á vegnum misti hann Alex Conklin og Mo Panov – sálarfrøðingin, sum hevur hjálpt honum so nógv í dystinum móti minnismissi.

Nú er Maria eisini deyð, og tað er um at koyra Webb av sálarligu eggini. Martin Lindros er nú einasti vinur hansara, og tá hann verður burturfluttur av arabiskum yvirgangsmonnum, fer Bourne sjálvandi avstað í eini seinastu bjargingarroynd. Royndin eydnast, men samstundis stendur greitt, at heimurin nú stendur fyri eini yvirgangsatsókn, har amerikanskir býir eru mál fyri kjarnorkuvápnum.

Onkursvegna hongur hendan tó saman við svikaliga minninum hjá Bourne. Hendingar, sum hann framvegis ikki minnist, stýra nógvum av tí, sum fer fram. Og onkursvegna vita yvirgangsmenninar alla tíðina, hvat Bourne hevur í hyggju at gera.

### Yngdur Bourne

Jú. Við Eric Van Lustbader hevur Jason Bourne av sonnum fingið eitt nýtt lív. Aldur er ikki longur nakað, sum tosað verður um, og vit lesa ikki longur um ein Bourne, sum gremur seg um aldurin, gráu hárini og slitnu limirnar. Bourne er nú bara ein agentur, hvørs avrik støðugt eru í toppi.

Kronologiskt leypir ketan eitt sindur av, tá ein partur av hendingini fer fram undan minnismissi hansara. Og tí skuldu bæði Bourne og Sooraya Moore, sum er makkari hansara í bókini, verið farin um tey seksti, men í aðrar mátar einki, sum bendir á ein agent, sum er farin at nærkast pensiónsaldrinum.

Action-parturin hjá Lustbader er fult á hædd við tann hjá Ludlum, og í sjálvum sær ger hetta bókina til agent-lesna í hægsta potensi. Hartil krevur bókin á ongan hátt, at lesarin hevur verið ígjøgnum hinar fýra Bourne-bøkurnar. Nakað, ið mest sum var ein fortreyt, skuldi lesarin veruliga fáa alla søgugongdina við í teimum.

Hinvegin er plottið ikki heilt so nær óhugnaligu samansvørjingunum, sum Ludlum meistraði betur enn nakar. Og í so máta er Betrayal heldur ikki heilt á sama støði, sum Legacy. Er tað samansvørjingar og ein ófrættakend heimsfatan, sum lesarin vil hava, er helst meira endamál í at lesa tær báðar bøkurnar um matarесararnar umaftur.

Bourne-fjepparar kunnu tó frøast um, at í Lustbader hevur Ludlum fingið ein produktivan arvtakara. Bourne Sanction og Deception eru longu sendar á marknaðin - tó at tær enn ikki eru umsettar til danskt - og longu komandi ár kunnu vit rokna við fimtu bókini frá Lustbader um Bourne. Agentin, sum fær James Bond at líkjast einum dukkufreti. ∆



*The Bourne Legacy*
(*Arven*)
Hóast hann aftur er vendur heim til lívið sum søgulærari, verður Webb enn einaferð drigin í skitna globala spælið. Hesa ferð verður hann fangaður í netinum hjá Stepan Spalko, sum hevur sett eina ræðuliga terror-atsókn ígongd. Samstundis vil Spalko tó hevna seg, og tað ger hann við at senda Khan eftir Webb. Ein leigudrápsmaður, sum vaks upp í skógini í Cambodia, eftir at mamma og systir hansara vórðu myrdar, og pápin síðani rýmdi undan síni ábyrgd. Men Khan hevur eisini onnur motiv fyri at gera seg inn á Bourne. Motivir, sum skulu finnast í tilveruni, sum Webb hevði, áðrenn hann gjørdist Delta One.

# Tann navnleysi skapti navnið



*Robert Ludlum*

**Søgan um Jason Bourne var tann, sum av álvara staðfesti støðuna hjá Robert Ludlum sum ein av heimsins fremstu krimi-høvundum**

BÓKMENTIR
*Jákup Mørk*

Við fleiri enn 290 milliónum seldum eintøkum av skaldsøgum sínum telist Robert Ludlum millum best seljandi krimihøvundarnar yvirhøvur.

Fyrstu árini var tað tó ikki hetta, sum lá í kortunum hjá einum produktivum høvunda, sum tó ikki var meira kendur enn so, at hann eisini nýtti tvey dulnevni – nevnliga Jonathan Rhyder og Michael Shephard. Men tá hann í 1980 sendi út bókina um navnleysa mannin, sum seinni vísti seg at vera Jason Bourne, kom gjøgnumbrotið. Ein filmatisering við Richard Chamberlain kom seinni á marknaðin, og fyri ikki so langari tíð síðani varð øll trilogiin um Bourne enn einaferð umskrivað til hvíta lørifitið. Hesa ferð við Matt Damon í høvuðsleiklutinum.

Við Bourne og ikki minst the *Matarese Circle,* sum varð útgivin árið fyri, skapti Ludlum sær samstundis sínar báðar best umtóktu sjangrur. Í øðrum førinum um super-agentin, sum er skaptur av Consular Operations - eini loynideild í CIA - og í hinum førinum um ein heim, har globalar fyritøkur, loyniligar hermegir og skipaðar stjórnir arbeiða fyri at stýra ella undirgrava demokratiið. Og í nøkrum førum sum samantvinnan av báðum tveimum.

Avgjørda styrkin í hesum var eitt framúr væl grundað research í tekniskum, landafrøðiligum, biologiskum og etniskum viðurskiftum, tó at kritikarar hansara ofta føra fram ein avmarkaðan kunnleika til vápn.

Tá Ludlum er bestur – og tað er ikki so sjáldan – er óhugnaliga fiktión hansara púrasta ítøkilig. Letur lesaran sita eftir við eini óhugnaligari kenslu av, at heimurin kanska ikki er so, sum vit halda hann vera. Við einum skelkandi ótta um, at vit kanska øll – eisini stjórnarleiðarar - bara eru lítlir brikkar í stóra talvinum, sum letur útvaldar einstaklingar stýra allari søgugongdini. Tó við the *Road to Gandolfo* (*Med paven som pant* á donskum) sum einum skriggjandi stuttligum undantaki.

Ludlum andaðist á grækarismessu í 2001, 73 ára gamal, men enn koma bøkur út við hansara navni. Í hesum hevur Eric Van Lustbader størsta leiklutin. Tað var nevnliga hann, sum eftirkomararnir hjá Ludlum heittu á at skriva tvær bøkur, sum vóru í gerð, lidnar, eins og hann nú er í fullari ferð við at gera Jason Bourne til ein amerikanskan pendant til James Bond. Enska super-agentin hjá Ian Flemming.

### Skaldsøgur

*The Scarlatti Inheritance* (1971)
*The Osterman Weekend* (1972)
*The Matlock Paper* (1973)
*Trevayne* (1973)
*The Cry of the Halidon* (1974)
*The Rhineman Exchange* (1974)
*The Road to Gandolfo* (1975)
*The Gemini Contenders* (1976)
*The Chancellor Manuscript* (1977)
*The Holcroft Covenant* (1978)
*The Matarese Circle* (1979)
*The Bourne Identity* (1980)
*The Parsifal Mosaic* (1982)
*The Aquitaine Progression* (1984)
*The Bourne Supremacy* (1986)
*The Icarus Agenda* (1988)
*The Bourne Ultimatum* (1990)
*The Road to Ohama* (1992)
*The Scorpio Illusion* (1993)
*The Apocalypse Watch* (1995)
*The Matarese Countdown* (1997)
*The Prometheus Deception* (2000)
*The Sigma Protocol* (2001)
*The Janson Directive* *) (2002)
*The Tristan Betrayl* *) (2003)

*) Skrivaðar lidnar av Eric Van Lustbader. *The Sigma Protocol* var seinasta skaldsøgan, sum Ludlum sjálvur skrivaði úr enda í annan, men bókin varð útgivin eftir deyða høvundans.

Skrivað saman við øðrum/Skrivað liðugt av øðrum
*The Hades Factor*/Gayle Lynds (2000)
*The Cassandra Compact*/Phillip Shelby (2001)
*The Paris Option*/Gayle Lynds (2002)
*The Altman Code*/Gayle Lynds (2003
*The Lazarus Vendetta*/Patrick Larkin (2004)
*The Moscow Vector*/Patrick Larkin (2005)
*The Arctic Event*/James H. Cobb (2007)
*The Infinity Affair*/James H. Cobb (kemur í 2010)

Framhald av Ludlum, skrivað av Eric Van Lustbader
*The Bourne Legacy* (2004)
*The Bourne Betrayal* (2007)
*The Bourne Sanction* (2008)
*The Bourne Deception* (2009)
*The Bourne Objective* (kemur í 2010)